

# Oljuprísurin byrjar vikuna við at lækka

**Jógvan Hugo Gardar**

28.12.2015 - 15:51

Oljan.fo

Eftir at oljuprísurin spakuliga hækkaði dagarnir áðrenn jól, og kom tætt uppundir 38 dollarar fyri eitt fat av Norðsjóvaroljuni Brent, so byrjar seinasta via í árinum við eini lækking.

Í løtuni kostar eitt fat av Brent 37 dollarar.

Amerikanska lættoljan WTI kostar framvegis meir enn Brent, eftir at WTI í farnu viku fór uppum Brent-prísin. WTI lækkar eisini, og kostar í løtuni 37,11 dollarar fyri fatið.